

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 06 - 2012

# Grønt ljós fyri Rosebank við markið í 2013

Tað eru gingin nógv ár, síðani Chevron saman við Statoil, Dong og OMV fann stóru oljukelduna Rosebank fáar kilometrar eystan fyri føroyska markið. Amerikanska fyristøðufelagið hevur brúkt nógva orku uppá at meta um, hvussu stórt hetta oljufundið er. Boriskipið Stena Carron varð bygt til m.a. at bora avmarkingar- og metingarbrunnar á Rosebank kelduni. Hesar hava sannført oljufeløgini um, at hóast torført er at fáa oljuna upp, so er Rosebank ein lønandi oljukelda, sum harvið kann útbyggjast. Nú tykist greitt, at Chevron helst fer at byggja út hesa einu ta størstu oljukelduna, sum er funnin vestan fyri Hetland seinastu mongu árini. Sambært oljublaðnum Upstream eru útbyggingarætlaninar komnar so mikið væl áleiðis, at kappingin er byrjað um, hvør skal byggja ein spildurnýggjan pall ella leiga ein verandi pall, sum skal taka sær av endaligu útbyggingini av Rosebankkelduni. Tey fimm feløgini, sum eru við í hesi kappingini, eru Seadrill, Fred Olsen Energy, Transocean, Stena Offshore og Odfjell. Keldur siga við Upstream, at endaliga avgerðin um at útbyggja Rosebank verður tikin í fyrru helvt av 2013. Verður hon tikin tá og avgerðin verður at byggja út, so byrjar útbyggingin í 2015, og fyrsta oljan verður veruleiki í 2017.